## HM í egning

Norðlýsið skrivar, at John Havn, sum í fjør vann FM í egning á Føroya Sjómannadegi fer um vikuskiftið til Kollefjord í norður Noregi at kappast um heimsmeistaraheitið í egning móti Norra og Íslandi. Kappingin verður á “Fiskeridagene” í Kollefjord í norður Noregi. Við í ferðalagnum úr Føroyum eru eisini umboð fyri Føroya Sjómannadag, og harafturat er borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, og leiðarin á mentanardeildini hjá Klaksvíkar Býráð, Dávur Winther. Teir verða gestir hjá Býráðnum í Kollefjord.



## Kongalig Ballett vitjar

Føroyingar kunnu gleða seg til eina stórsligna uppliving, tá ið Kongaliga Ballettin leygardagin vitjar í Norðurlandahúsinum við bæði klassiskum og modernaðum perlum. Á skránni vera millum annað tvey verk, sum hava fingið bestu ummælini hetta leikárið. “10 to Hyper” eftir Jorma Elo úr Finnlandi, sum varð frumsýnt í 2006, er ein erotisk og kraftmikil dansur fyri ein mann og eina kvinnu – í svørtum, skyggjandi búnum, við tónleiki eftir Mozart. Hitt nýggja verkið er “Dancing on the Front Porch of Heaven”, varð frumsýnt í februar í ár.

# Skotsk gávu til Barnaheimið

**Líka síðani 2002 hevur áskoðarafelagið hjá skotska landsliðnum, nevnt Tartan Army, veitt peningagávur til vælgerandi endamál, aloftast slíkum, ið kemur børnum tilgóða**

LANDSDYSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað kom sum eitt positivt »yvirraskilsi« hjá starvsfólkunum á Barnaheiminum í Havn, tá tey knappliga vórðu ring upp av umboðum fyri vælgerandi deildina hjá skotsku fótbóltsáskoðarunum við boðum um, at teir fegnir vildu veita barnaheiminum eina peningagávu.

Skotarnir greiddu frá, at hetta er vorðin traditión, at teir, tá teir ferðast til útidystirnar hjá Skotska landsliðnum, altíð veita stovnum ella einstaklingum í vertslandinum eina peningagávu.

Alt byrjaði, tá the Tartan Army, sum áskoðarafelagið nevnist, vitjaði í Bosnia-Herzogovina. Tá kom fyri oyruni á teimum, syrgiliga søgan um ein lítlan drong, hin 10-ára gamla Kemal Karic. Longu sum pinkubarn, sjey mánaðar gamal, varð annað beinið so illa skatt av einari bumbu, at tað mátti setast av (amputerast). Mamman rann eftir skýli, men kláraði tað ikki, og misti lívið, meðan ungi sonurin altso misti beinið.

Tá Tartan Army frætti um hetta, skipaðu teir fyri einari innsavning, sum gav 4.800 pund sterling, góðar 50.000 krónur, sum allar óskerdar vórðu latnar unga dreinginum.

Síðani tá hevur Tartan Army stovnað hjálparfelagsskapin hjá felagnum, sum teir nevna Tartan Army Sunshine Appeal. Heimasíða teirra nevnist www.tasunshineappeal.co.uk

### 10.000 krónur til Barnaheimið

Nú Tartan Army er í Føroyum í sambandi við landsdystin móti Skotlandi á Svangaskarði í kvøld, spurdu teir seg fyri, hvat var ein hóskandi móttakari av peningagávu teirra, og endaði tað við, at teir valdu Barnaheimið.

Seinnapartin í gjár vóru teir so á vitjan har og handaðu Barnaheiminum ein kekk áljóðandi 10.000 krónur. Marita G. Hansen, ið starvast á Barnaheiminum, hevr havt samskifti við skotarnar, sum vildu hava eina frágreiðing um, hvat tey ætlaðu at nýta peningagávuna til.

Marita sigur, at tey greiddu skotunum frá, at peningurin heilt vist fór at verða nýttur til eina ferðauppliving til tey ungu á heiminum. Ynskiligt hevði verið, um tey høvdu kunnað vitja Skotland fyri peningin, tí tað hava tey roynt einaferð áður, og tað var ein framúr túrur. So tað er fyrsta málið, men ber tað ikki til, kunnu tey í hvussu er nýta peningin til eina vikuskiftisferð í Føroyum, heldur Marita Hansen.

Á Barnaheiminum eru tvær deildir, ein ungdómsdeild til ung millum 12 og 18 ár við plássi fyri 6 børnum, og ein familjudeild við tveimum íbúðum.



*Skotska Tartan Army Sunshine Appeal handaði Barnaheiminum ein kekk áljóðandi 10.000 krónur*

# Skotar yvirtikið Café Natúr

**- Vit hava verið noydd at kalla eyka hjálp inn, og vit hava havt durðavørðar frá tí vit lata upp klokkan 11 fyrrapart, til vit lata aftur á miðnátt, sigur Ulla Poulsen, dagligur leiðari**

LANDSDYSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Klokkan var lítið meiri enn farin av níggju í morgun, tá vit vóru inni á Café Natúr – ein túr. Har var næstan fullsett av skotum, men í mun til vanligu myndina tú ger tær av hesum fryntliga og lívliga fólkaslagi, var tað ikki øl, men kaffi og rundstykkir, teir heltu niðurum.

So hetta var fyri so vítt ein rólig løta hjá starvsfólkinum, men soleiðis hevur ikki verið teir seinastu dagarnar. Har hevur verið á tremur av skotskum fótbóltsviðhaldsfólki frá tí latið varð upp til latið varð aftur.

- Her hevur verið ein ótrúlig rúgva av skotum hesar dagarnar. Vit hava verið noydd at tilkalla eyka manning, og tað hevur verið úr at gera alla tíðina, sigur Ulla Poulsen, dagligur leiðari á Café Natúr.

Hon sigur, at tey hava verið noydd at hava durðavørðar alla tíðina fyri at halda skil á. Ikki at tey hava havt nakrar trupulleikar av gestunum, men bara stóra talið av vitjandi hevur gjørt tað neyðugt, at hava fólk at halda skil á.

Vanliga letur Café Natúr ikki upp fyrr enn klokkan 11 fyrrapart, men tey høvdu fingiði uppringing úr Skotlandi at vita, um tey kundu undantaksvís lata upp klokkan 8 í morgun, tí fleiri bussar av ferðafólki skuldu verða í Havn um hálvgum níggju-tíðina.

- So tí eftirlíkaðu vit. So nú borðreiða vit við kaffi og rundstykkjum. Vit spurdu okkum fyri, um til bar – við undantaksloyvi – at skeinkja fyrr enn vanligt, men tað bar ikki til. So inntil klokkan er 11, verður kaffi tað sterkasta, ið gestirnir fáa, segði Ulla Poulsen, tá vit hugdu framvið í morgun.




*Ulla Poulsen og starvsfólkið annars serveraðu rundstykkir og kaffi fyri skotsku gestunum í morgun*

*Mynd: Álvur Haraldsen*